# Volontør innan barna- og familjuøkið

Barna- og familjuøkið hjá Kirkjuligu Heimamissiónini er stórt og spennandi øki. Hevur tú hjarta fyri børnunum og familjum? So er hetta ein fantastiskur møguleiki hjá tær!

Sum volontørur innan barna- og familjuøkið ert tú í tøttum samstarvi við Barna- og familjuráðgevan hjá Heimamissiónini. Tú ert við til arbeiðið við legum, tiltøkum o.ø. sum er á skránni hjá SIMBA og EINDINI.

Uppgávurnar, sum tú kemur at hava, kunnu tó í stóran mun tillagast tín áhuga og tíni evni. Tað eru nógvir møguleikar og nógv evni, sum kunnu nýtast innan barna- og familjuøkið hjá Heimamissiónini. Sum volontørur hevur tú tí góðar møguleikar at menna teg innan tín egna áhuga, so leingi tað kann rúmast innan barna- og familjuarbeiðið.

Endamálið við øllum virkseminum hjá SIMBA og EINDINI er at boða boðskapin um Jesus sum besta vin barnanna (og hjá teimum vaksnu).

Sum heitið *volotørur* sipar til, so er talan um sjálvboðið arbeiði. Volontørurin fær tó eina samsýning á 6000 kr. um mánaðin til lívsins uppihald og eitt sindur av lummapengum.

Tú verður partur av arbeiðsumhvørvinum í Nesvík, har tú samstarvar við hini starvsfólkini, serliga ráðgevan, umframt nógv sjálvboðin. Afturat hesum vera ymiskar uppgávur, har tú skal duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Um tú ert áhugað-/ur ella hevur spurningar viðvíkjandi starvinum, ert tú vælkomin at venda tær til:

Andrias Magnussen, aðalskrivara

andrias@mission.fo Tlf: 230070

Starvstíðin er upp til 6 mánaðir, við møguleika at forleingja inn í næsta ár.

Volontørurin verður settur eftir avtalu.